# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Til minnis um Henning Olaf Joensen

Tað verður sagt, at lívið kann myndast í teimum fýra árstíðunum, har hvør árstíðin hevur sín egna máta at greiða okkum frá lívinum.

Várið, sum barnaárini, summarið, sum ungdómsárini, heystið, sum tilkomin og veturin, sum gamal.

Í myndataluni um árstíðirnar, sum her er talan um, so liva vit árstíðirnar, sum bæði kunnu vera langar og ljósar, eins og stuttar og myrkar ella ein blanding av hesum.

Tá lívið skal myndast í árstíðum hava vit øll tað vón, at vit uppliva allar fýra árstíðirnar, har ein sum gamal er mettaður av døgum og í friði og náðum kann leggja frá sær.

Vit góðtaka soleiðis at ein gamal skal doyggja, men skilja ikki, at ein ungur kann doyggja, men hetta minnir okkum á, at vit eiga at takka Gudi fyri hvønn dag vit fáa her á jørð. Lívið er eingin sjálvfylga, men ein gáva frá Gudi, sum vit eiga at vera takksom fyri.

Henning fekk staðfest ein vøkstur í heilanum, sum seinni vísti seg at vera ólekiligur og sum at enda gjørdi av við hann.

Krabbameinssjúkan nívdi hart, bæði hjá honum sjálvum, hjá mammu og okkum øllum.

Í fyrstani var hetta bert nakað, sum skuldi viðgerast og lekjast og so kundi lívið fara víðari. Men so einfalt kom hetta ikki at blíva.

Aftaná fleiri viðgerðir og drúgva bíðitíð, kundi bert staðfestast, at eingin lekidómur var.

At endanum góðtók hann støðuna og varð greiður yvir, hvønn veg tað bar. Ongantíð gramdi hann seg um nakað, men góðtók alt, til sjúkan at enda fór við honum.

Okkara góði Henning náddi soleiðis várið, summarið og ein part av heystinum.

Henning var føddur 17. januar 1941 í Vági, sonur Hans Joensen (1914-1944) úr Hattarvík og Marin Kristiannu Poulsen (1907-1999) úr Vági.

Tey vóru 4 systkin, Hartvig Poulsen (1932), sum Kristianna átti áðrenn hon giftist við Hans, síðani Sigrun (1939-1991), Henning (1941-2006) og Hansa Kristina (1944).

Henning kom í 1973 vestur til Miðvágs og kom hann at blíva verandi.

Henning hevði nógvar góðar gávur frá skaparans hond – eitt nú sum timbursmiður, sum eisini í størsta mun kom at vera hansara arbeiði í fleiri ár saman við Valdemar á Løgmansbø.

Eina tíð var Henning í Grønlandi, sum kokkur við "Jóhannu Kristinu", sum svágurin Kaj Hjallgrímsson førdi og átti part í. Eisini her vísti Henning síni góðu evni at matgera.

Seinnu árini hevur Henning smíðað hjá Thorfinn Hansen í Miðvági og hava teir havt arbeiði víða um. Tá Miðvágs kirkja skuldi hava nýggja tekju, var hetta eitt arbeiði, sum Henning eisini skuldi taka lut í, men sum hann ongantíð kom til.

Mamma kom enn einaferð at uppliva, at ein sum stendur einum næst, verður tikin burtur mitt í sínum lívsverki og í góðum árum – tað er svárt. Plássið í heiminum stendur tómt – longsulin stórur, men minnini eru dýrabar.

Góða mamma gott hjá tær at hava vakra urtagarðin at fjálga um í hesi sváru tíð.

Henda 1. juli – ein regnvátan leygardag fylgdi ein stórur skari honum úr Miðvágs kirkju til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

Meðan regnið oysti niður og regndroparnir blandaðu seg saman við tárunum, ið runnu eftir kjálkunum, ja, tá fingu vit hvør sær, stilt tigandi høvi til at siga eitt síðsta farvæl, meðan vit sungu seinasta sálmin "So tak tá mínar hendur".

Vit syrgja ein av okkara, sum nú er farin, men vit gleðast um, at heima hjá Gudi hava øll tað gott.

Hvíl í friði góði Henning og takk fyri alt tú vart fyri okkum. Gott at eiga góð minnir, sum vit í takksemi kunnu liva víðari við.

Svágur tín Harry Birtilíð, sáli, yrkti í 1971 3 erindi við yvirskrivtini Bøn og við heitinum Leið okkum heim og lat tað verða seinastu orðini á leiðini.

*Mín faðir á himni*
*vit fara avstað*
*og leggja á vandafull mið.*
*Fylg okkum Harri*
*frá dag til dag –*
*og í náttartímanum við.*

*Tá ódnin er harðast*
*tú verj okkum tá*
*so ikki vit fella í fátt.*
*Tí skipið er lítið*
*og havið so stórt –*
*tað øsist av stormi so brátt.*

*Ver við okkum Harri*
*í stormi og logn*
*og gev okkum signing í fylgju.*
*Tá túrin vit enda*
*og kósin er sett –*
*so leið okkum heim yvir bylgju.*

Í Søldarfirði 5. august 2006.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Rachel Samuelsen**, Tórshavn; fødd Fonsdal, ættað úr Vestmanna, andaðist leygardagin 5. august 94 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Solveig Kjælnes**, Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjakvøldið 4. august, 55 ár Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum í kvøld kl.18.00. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl. 13.00.

Kistan við K**athrinu á Neystabø** fer úr Landssjúkrahúskapellinum í Havnar Kirkju týsdagin 8. august klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju mikudagin 9. august klokkan 13. Tey, sum vilja minnast Kathrinu, kunnu geva eina gávu til Gigtafelag Føroya. Konta í peningastovnunum

**Siri Davidsen** úr Sørvági, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 3. august, 27 ára gomul. Jarðarferðin verður úr heiminum, í Gerðinum 23 í Sørvági, í morgin, týsdagin kl. 14.00. Tey, ið vilja minnast Siri, kunnu lata eina pengingagávu; konta í Føroya Banka.

## Dagurin í morgin

**8. august. Rut.** Dagurin vígdur minninum um kvinnuna, sum Rutarbók í Gamla testamentið er skrivað um.

Týdningurin av bíbilska navninum er ókendur, kanska merkir tað *vinkona* ella *trúgv*.

## Gullbrúdleyp í Svínoy

Í dag, mánadagin 7. august, hava Fríðgerð og Heini Joensen í Svínoy verið gift í 50 ár. Gullbrúdleypsdagin eru tey stødd í Havnini.

Fríðgerð er fødd 9. september í 1933. Hon var yngst av teimum sjey børnunum hjá Onnu og Jóannesi bónda í Heimistovu í Svínoy. Heini er føddur 12. juni í 1931. Hann er miðlingur av teimum trimum børnunum, sum Petra og Sámal Joensen áttu. Petra og Sámal búðu fyri tað mesta í Havnini, og Heini vaks upp hjá ommuni í Svínoy. Heini situr við festinum Har Heimi, sum tað verður nevnt í Svínoy.

Tá ið Fríðgerð og Heini giftust í 1956, fluttu tey í húsini sum fastur hennara, Annika, og Heina Justinussen áttu í Klingrugarði. Tey bæði vóru longu undir krígnum flutt til Klaksvíkar at búgva.

Miðskeiðis í seksti árunum keyptu Fríðgerð og Heini hús uppi á Váli, og har hava tey búð síðani.

Tey bæði hava í mong ár verið millum álitisfólkini í heimbygdini. Hesa hálvu øldina, tey hava livað saman í hjúnarlagi, er fólkatalið nógv minkað í Svínoy. Tá ið tað nú hevur lagað seg soleiðis, hevur tað komið væl við, at tað hava verið tey, sum so at siga hava hildið tørn og kent ábyrgd.

Fríðgerð og Heini eiga tvey børn, og tey búgva bæði í Havn. Heri Joensen (1956) er prestur í vestara prestagjaldi í Suðurstreymi, og Anna Jórun Heinadóttir (1969) er pedagogur. Barnabørnini eru fimm – tveir dreingir og tríggjar gentur.

Fríðgerð hevur mest sum alla sína tíð búð í Svínoy, har hon hevur ansað heiminum, tikið sær av fenaðinum, havt handil, verið heimahjálp og verið álit á so mangan hátt. Eitt nú hevur prestur nógvu tey seinastu árini hildið til hjá Fríðgerð og Heina, tá ið hann hevur vitjað í Svínoy.

Heini var í mong ár skipsmaður og útróðrarmaður. Í nógv ár róði hann út við Fuglbergi og Áarbergi, sum svínoyingurin Poul Justinussen, sáli, sum búði í Klaksvík, átti. Eftir at Poul Justinussen hevði selt bátarnar, fór Heini at arbeiða heima í Svínoy. Tað gjørdi hann so leingi, sum orkan var til tað.

50 ára brúdleypsdagin eru Fríðgerð og Heini at hitta heima hjá soninum.

